

G.g. Hetta heftið er ikki liðugt, men ein fyribilsútgáva!

# Les tað við smáum!

Næmingabókin, síða 14-19

Førleikar:

- At fremja samfelagsfrøðiligar kanningar, bæði av kvalitativum og kvantitativum slagi. At skilja, nær teir ymisku kanningarhættirnir eru hóskandi at brúka.
- At eygleiða einfaldar samfelagsligar samanhangir í nærumhvørvinum. At gera kanningararbeiði úti í samfelagnum, har smærri einfaldar samrøður ella spurnakanningar verða nýttar.

Ein vøra er ikki bara ein vøra. Stórur munur kann vera á góðskuni, alt eftir slag. Málið er eisini at læra næmingarnar at vera tilvitaðar brúkarar.

Finn fram líknandi vørur av ymiskum slagi. T.d. súltutøy, majones, livradeiggj o.s.fr. Vel bílig og dýr sløg av vøruni. Hvørjar rávørur eru í? Hvussu nógv sukur er í? Hvussu við øðrum ílatingarevnum?

Til ber eisini at skipa hetta sum ein hugnatíma, har ymiskir næmingar taka ymiskar vørur við. Síðani ber til at samanbera vørurnar.










